# Fólkaflyting av útoyggj

**Tað stendur einki til við fólkatalinum á útoyggj í Føroyum. Hetta varð ávíst á evnisdegnum um støðuna á útoyggj, sum hildin varð í Havn á grækarismessu. Allastaðni uttan í Kalsoy er fólkatalið minkað seinastu trý árini**



*Nógv fólk var á útoyggjafundinum á Hotel Hafnina. Bæði útoyggjafólk, politikarar og fólk frá stovnum og fyritøkum, sum hava samskifti við útoyggjar*

*Mynd: Edvard Joensen*

ÚTOYGGJAFUNDUR
*Edvard Joensen*

Fólkatalið á útoyggj minkar støðugt. Serliga í Skúvoy hevur verið vánaligt seinnu árini. Ikki færri enn 20 fólk eru flutt av oynni seinasta árið. Og tað var umleið ein triðingur av samlaða fólkatalinum í Skúvoy.

Tað er sama søgan mestsum allastaðni, segi Olga Biskopstø, samskipari hjá Útoyggjafelagnum, tá útoyggjafundurin varð settur á Hotel Hafnia grækarismessudag. Hon vísti við talvum, hvussu gongdin hevði verið seinastu trý árini. Og har var minkað allastaðni uttan í Kalsoy. Og í Kalsoy var eisini tann munurin, at talið á ungfólkið var ikki lægri enn á teimum, sum vóru í eldra endanum. Helvtin av teimum, sum búgva í bygdunum á Kalsoynni, eru undir 20 ár, og tað er hugaligt, staðfesti fundurin.

Hetta mundi helst fyri stóran part koma av teimum vónum, kalsoyingar nú hava til ferjuleguna á Syðradali, helt Olga Biskopstø.

Øðrvísi er á hinum útoyggjunum. Eitt nú stendur heilt illa til í Hattarvík, vísti Olga Biskopstøð á. Har búgva mestum bara eldri menn, so har sær púra einki út.

## Smoltdeyðin

Tá smoltstøðin í Svínoy varð noydd at lata aftur, doyði eisini tann lønandi vinnan, sum var í oynni, út.

Bjarni Jacobsen greiddi frá søguni frá smoltstøðini, sum verið hevur í Svínoy seinnu árinu.

Hann segði, at teir byrjaðu við hálvari aðru milliónum smoltum í síni tíð, og tá nú latið varð aftur, var framleiðslan tíggjufaldað.

Hesi 18 árini, smoltsøðin í Svínoy hevur verið virkin, hevur hon goldið umleið hálvaaðru millión krónur í arbeiðsløn um árið, segði Bjarni Jacobsen.

Hóast hann sum vera man harmaðist um, at teir vórðu noyddir at gevast, tí støðan hjá alivinnuni er vorðin so vánalig, hevði hann ikki mist vónina um, at tað fer at bera til at koma i gongd aftur, tá uppgongd aftur verður í alivinnuni.

Og hann tóktist bjartskygdur háost alt. Hann vísti á, at støðin stendur úti í Svínoy. Hon er í góðum standi, segði hann og er púra klár at taka í brúk aftur, tá útlit eru til, at tað kann bera til aftur.

Men eins og flestu onnur, sum tosa um viðurskiftini á útoyggj, vísti hann til samferðsluna.

– Hon er einki broytt í míni tíð, segði Bjarni Jacobsen, sum metti tað sum eina fortreyt fyri víðari menning av oynni, at ein tunnil verður gjørdur úr bygdini yvir í Havnina.

– Vit hava eitt stað í Svínoy, har Várharra hevur gjørt okkum eina havn, og tað eitur stutt og greitt Havnin, segði hann. Hana fáa vit ikki gagnnýtt, um vit ikki sleppa til hana, og tað ber so bara til við einum tunli. Um so var, hevði tað bara tikið eitt korter at siglt inná Borðoynna.

## Samferðslan

At samferðslan er týðandi partur av lívinum á útoyggj, er mangan staðfest og varð tað aftur á fundinum í Havn hendan dagin.

Bjarni Djurholm, landsstýrissmaður við vinnumálum, kundi ikki lova nakran tunnil í Svónoy, men segði, at umstøðurnar verða kannaðar. Somuleiðis vísti hann á, at eisini úti í Mykinesi verður arbeitt við at bøta um samferðslumøguleikarnar við eini nýggjari lending í Hellisgjógv.

Tummas Frank Joensen í Skúvoy kom eisni inn á samferðsluna til og úr Skúvoy. Hann vísti á, at har var gott ferðasamband um fjørðin og takkaði Strandferðsluni fyri ta góðu tænastu, skúvoyingar hava í so máta. Tað er ikki grundin til flytingina av oynni, helt hann.

Men eitt hjartasuff hevði hann kortini, Og tað var sjálvt farið, sum siglir um Skúvoyarfjørð. Sildberin.

Hann var góður og eitt stórt framstig, tá hann kom i síni tíð. Men nú er hann farin at eldast og væntandi skulu rímilig stórar ábøtur gerast í næstu framtíð, helt Tummas Frank Joensen. So stórar, at ivasamt er, um ikki skal hugsast um eitt heilt nýtt skip.

Hann vísti eisini á, at í fjør minkaði talið á fremmandum ferðafólki, sum kom til Skúvoyar, heilt munandi. Og tað komst av, at Strandferðslan varð noydd at spara ein túr burtur millum Gomlurætt og Skopun. Tað ávirkaði aftur í hinum endanum, tí fólk fingu ikki tíð at gera dagstúrar til Skúvoyar.

Henrik Old, løgtingsmaður, kom eisini inn á samferðsluna og serliga í Norðoyggjum. Hann segði, at hann krepti tærnar, tá hann hugsaði um umstøðurnar, norðoyingar hava við skipum, sum eru 70 og 50 ára gomul. Hann sipaði til Barskor og Másan.

– Tað finnast góð og bílig skip aðrastaðni, sum saktans kundu brúkst til sigling til eitt nú Fugloyar og Svínoyar, segði hann. Eitt nú segði hann seg vita um eina rímiliga nýggja norska ferju, sum kundi fáast fyri heilt bíligan penga. Ein ferja, sum varð løgd, tí oyggjarnar, hon sigldi til, nú høvdu fingið undirsjóvartunnil.

Vit fara í seinni blaði at venda aftur til útoyggjafundin á Hotel Hafnia grækarismessudag.



*Smoltstøðin í Svínoy er afturlatin. Men eigarin er bjartskygdur og væntar, at virksemi verður aftur á støðini, tá alivinnan kemur upp undan aftur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Másin varð eisini viðgjørdur á útoyggjafundinum. Henrik Old krympar tærnar, tá hann hugsar um umstøðurnar, tey hava norðanfyri. Men Másin er gott íkast hjáVágs Skipasmiðju, segði hann og sipaði til, at skipið á ellisárum oftari og oftari treingir til ábøtur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*





*Í fyrireikingarbólkinum, sum longu hevur havt sín fyrsta fund, sita: Søren Poulsen, Bjarki Fjørdal, Andras Gregersen og Meinhard Jacobsen, ið er stigtakari til Maersk-siglar*

# Mærsk-siglar fyrireika felag

**- Tá ið tú siglir úti og kemur heimaftur, kann tað vera torført at koma innaftur í sosiala lívið uppi á landi, sigur Meinhard Jacobsen, ið er stigtakari til felagið, sum ætlandi verður stovnað á Føroya Sjómansskúla 3. juli**

MÆRSK-SIGLAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin, 6. mars, var fundur í bygdarhúsinum á Strondum, har 23 fólk, sum sigla við Mærsk, vóru savnaði. Tað var Meinhard Jacobsen, sum býr í Kolbanagjógv, ið tók stig til at kalla Mærsk-siglar saman til fundar. Endamálið er at stovna eitt felag fyri hesi fólk, har tey kunnu savnast, taka ymisk mál upp og annars hugna sær saman.

Meinhard sigur, at honum kunnugt, hava ikki aðrir, sum sigla í uttanlandssigling, slík feløg í Føroyum.

- Í fyrsta lagi hugsa vit um at savna fólk saman í felag, sum sigla hjá Mærsk, men óhugsandi er ikki, at onnur í uttanlandssigling kunnu koma við í felagið seinni.

Meinhard sigur, at orsøkin til, at hann tók stig til fundin, er, at fólk í uttanlandssigling stundum kunnu hava torført við at koma innaftur í sosiala lívið uppi á landi.

- Hóast tøkni er umborð á skipinum til samskifti, er nógv, sum fer aftur við borðinum, tá ið tú ert burtur leingi. Tí helt eg, at tað hevði verið gott og gevandi fyri okkum, um vit høvdu eitt felag, har vit kunnu savnast til álvara og gaman.

## Fyrireikingarbólkur

Á fundinum í bygdarhúsinum, sum byrjaði við kaffimunni og rundstykkjum og endaði við smyrjibreyði, varð settur ein fyrireikingarbólkur, sum fer at gera eitt uppskot til reglugerð fyri felagið, ið væntandi verður eitt áhugafelag ella frítíðarfelag.

- Vit hava fingið høllina á Føroya Sjómansskúla, har vit ætla at hava stovnandi aðalfundin, 3. juli.

Hann sigur, at á fundinum í bygdarhúsinum vóru fólk, sum starvast á flestu postum umborð á Mærsk-skipunum.

- Hetta var ein hugnaligur og gevandi fundur. Onkur helt, at kanska var tiltakið ikki nóg væl lýst, tí mett verður, at einir 200 føroyingar sigla við Mærsk-skipum.

Meinhard sigur, at flestu eru umborð eftir skipanini, sum rópt verður 1-1. Tað merkir, at teir eru somu tíð umborð, sum teir eru heima.

Sum skilst, eru fleiri úti einar tveir mánaðir og so heima í tveir. Tískil má roknast við, at umleið helmingurin av føroyingunum, sum sigla hjá Mærsk, eru burturstaddir.

Sjálvur hevur Meinhard Jacobsen siglt hálvt annað ár hjá Mærsk. Hann er fyrsti stýrimaður og hevur frammanundan siglt í uttanlandssigling hjá øðrum reiðaríum.

Saman við Søreni Poulsen, Bjarka Fjørdal og Andrasi Gregersen, er Meinhard við í fyrireikingarbólkinum.

Aðrir, sum eru við í bólkinum, men sum allir ikki eru heima, eru Karlot Hergeirsson, Jónsvein Berg, Jón E. Simonsen og Thomas Lambastein.

Fyrireikingarbólkurin hevur havt sín fyrsta fund, og ætlanin er, at bólkurin skal savnast einaferð um vikuna skiftandi millum nevndarlimirnar – fram til stovnandi aðalfundin fyrst í juli.

## Sáttmálin í afturhond

**- Eg haldi, at umstøðurnar hjá okkum í langfarasigling eru hampiliga góðar, sigur Meinhard Jacobsen**

SIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Meinhard Jacobsen, sum er stigtakari til felagið, Mærsk-siglar, veit at siga, at høvuðssáttmálin hjá teimum, sum sigla við Mærsk, gongur út nú 1. apríl. Hann væntar ikki, at tað verða teir stóru trupulleikarnir at fáa ein nýggjan sáttmála undir land. Í øllum førum veit hann einki um, at verkføll hava verið í handilsvinnuni, síðan hann byrjaði í uttanlandssigling. Onkur skip, sum ikki hava hildið sínar avtalur, eru blokerað, men Meinhard heldur, at hetta í flestu førum eru skip, sum koyra við skegginum í postkassanum.

Umframt høvuðssáttmála, eru sersáttmálar eisini galdandi millum skip og manning.

Meinhard heldur, at umstøðurnar hjá fólki í uttanlandssigling sum heild eru rímiliga góðar, og lønarlagið er góðari leið, sum hann tekur til.

- Høvuðssáttmálin er galdandi í fýra ár. Einki stendur í stað, og tí sigur tað seg sjálvt, at gamli sáttmálin á onkrum økjum er í afturhond, nú samráðst verður um nýggjan sáttmála, sigur Meinhard Jacobsen.

# Nógv fólk á borgarafundi í Nólsoy

**- Eg eri ógvuliga spentur uppá, hvat úrslitið verður, sigur Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður í Nólsoy**

FÓLKAATKVØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin var borgarafundur í Nólsoy í samband við, at fólkaatkvøða verður í kommununi komandi leygardag um møguliga samanlegging við Tórshavnar kommunu.

Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður, sigur, at eini 120 fólk vóru á fundi, og hann heldur, at hetta var ein góður fundur, har nógvir ymiskir spurningar vórðu reistir.

- Í fyrsta lagi greiddi eg frá sáttmálanum um samanlegging og vísti á, hvørji høvðsmálini aftanfyri ætlanina eru.

Tað er nevniliga eitt samt bygdarráð, sum mælir til at leggja Nólsoyar kommunu saman við Tórshavnar kommunu.

Eftir frágreiðingina hjá Jógvani, høvdu fólk høvi at seta bygdarráðsformanninum og býráðsformanninum í Havn, Jan Christiansen, spurningar.

## Nógvir spurningar

Jógvan sigur, at fólk høvdu nógv uppá hjarta, og náttúrliga vóru tað serliga tey ivingarsomu, sum høvdu nógv at spyrja um.

- Eg haldi, at hetta var ein positivur fundur. Kanska var onkur eitt sindur lunkaður, men hetta er ikki annað, enn roknast kann við á einum borgarafundi, tá so týðandi mál eru til viðgerðar.

Spurdur, hvørjum úrsliti hann roknar við á fólkaatkvøðuni komandi leygardag, sigur Jógvan, at tað dugir hann slett ikki at meta um. Hinvegin dylur hann ikki, at bygdarráðið vónar, at borgararnir í Nólsoy taka undir við at leggja kommunurnar saman.

Jógvan ásannar tó, at í Nólsoy eru fólk bæði fyri og ímóti samanlegging.

Á borgarafundinum í Nólsoy segði Jógvan Arge, býráðslimur í Havn, eisini nøkur orð.

## 203 veljarar

Í Nólsoy eru tilsamans 203 veljarar, og valhølini verða opin leygardagin sum vanligt, tá ið val er.

Jógvan Thomsen sigur, at brævatkvøður vórðu sendar út mánadagin, og annars ber til at atkvøða við brævatkvøðu bæði í Nólsoy og á Snarskivuni í Havn til hósdagin, soleiðis at atkvøðurnar eru komnar í valkassan, tá ið hølini lata upp leygarmorgunin.

Á atkvøðuseðlinum er ein spurningur, sum svarast kann ja ella nei uppá:

Heldur tú, at Nólsoyar kommuna og Tórshavnar kommuna skulu leggja saman í eina kommunu?

- Eg eri ógvuliga spentur, hvussu útfallið verður, sigur bygdarráðsformaðurin at enda.